



# MARSTIN AND THE REVELATORS á Fjarðafestivalin

**Fjarðafestivalurin nærkast í stórum. Sum kunnugt verður hann í ár 5 – 7 juni. Útlendskir og føroyskir bólkar og solistar fara at trína á pallin við teirra tónleiki. Tað verður ein breið vifta av ymiskum tónleiki, alt fá hørðum rokktónleiki, gospelkóri til meira siðbundnan tónleik og sang. Spennandi verður at hoyra Jeremy Camp, Superhero, Jan Honningdal, T.O.S., Credo, Heine Lützen, Sølva Ford, Fríðbjørg Jensen og onnur**

Fyrireikarar siga soleiðis um bólkin:

– Teirra framførslur eru ein meistaralig blanding av "folk rock" við íblástri av blues og country undir ávirkan av tí besta frá Johhny Cash, Bob Dylan og Nick Gave. Martin and The Revelaters folda seg út við øllum frá feitum grooves og hjartanemandi balladum til drama og songum sum siga frá søgum, siga teir.

Síðani teir byrjaðu í 2008, hava hesir ungu menninir spælt fyri fleiri túsund áhoyrarum á festivalum runt um í Evropa. Eitt nú kann nevnast Bretland, Ísland og Føroyar. Martin er kendur fyri at verða nærverandi á pallinum og hetta smitta eisini av á áhoyrararnir. Sangir sum Salmon Song fær áhoyrararnar í kók. Teir hava longu vunnið tríggjar kappingar í Bretlandi, millum annað kann nevnast Moles Students Battle of the Bands og The best of the South West Acoustic. Í 2008 luttóku teir eisini á Fjarðafestivalinum og tóku teir øll á bóli við teirra intensu framførslu.

- Aftur í ár hava vit tað stóru gleði at kunna bjóða teir fram á festivalinum. Spennandi verður at uppliva teirra framgongd, siga fyrireikara.